# bygdarfólkið



*SAMSTARV: Fólk í Hvannasund eru ójøvn á máli, hvørt bygdin skal leggja saman við Klaksvík ella ikki. Ein teirra sum er fyri samanleggingini er Palli Simonsen (uttast høgrumegin) sum her prátar við Gulak og Louis. – Eg dugi ikki at síggja annað, enn at vit mugu øll samstarva, sigur Palli*

*Mynd: Høgni Thomsen*

um teir í bygdaráðnum vilja selja bygdina til tann, ið bjóðar hægst.

- Fyrr vóru helst fleiri fyri eini samanlegging, men í dag eru tey helst í minniluta, tí einki er hent í so máta, siga fólk.

**Markið við Djúpini**

Ein annar partur, sum kanska er nakað minni enn tann omanfyri, eru tey sum meta tað sum eina sjálvfylgju at báðar kommunurnar fara í enn størri enn í dag.

- Fyri mær er eingin ivi um, at allar Norðoyggjar áttu at a og kunna verðið til eina einstaka og sterka kommunu.

- Tá átti ein ikki at tosa um mark millum bygdirnar her í økinum, men bara sett Djúpini sum mark millum Eysturoynna og ta stóru Norðoyar kommunu í framtíðini, siga onnur.

Fleiri bera haraftrat ótta fyri, at um kommunurnar ikki verða samanlagdar sjálvbodnar, so verða tær rætt og slætt tvungnar at leggja saman í framtíðini.

- Tí hevði verið nógv betri, at vit gjørdu tað nú í beinleiðis samráðingum, og altso ikki við knívinum á barkanum.

- Lívið er alt ov stutt til innanhýsis klandur. Latum okkum finna eitt gott stev og fara í positivar samráðingar við klaksvíkingar, siga tey.

*„Taðvejden, fara vit saman við Klaksvík, so steðgar øll menning upp her í bygdini. Vit verða snøgt sagt svølgd av tí stóra*

## Trý á gøtuni

**Eitt er, hvat bygdaráðið heldur og ætlar um í framtíðini. Men hvat sigur bygdarfólkið?**
**Vit vóru í Hvannasundi mikudagin og spurdu nøkur fólk á gøtuni í Norðdepli og í Hvannasundi.**

### – Tosa seg til sættis



Páll Trondesen úr Depli er fyri eini samanlegging við Klaksvík.
Orsøkin til hetta er hin einfalda: - Vit verða helst tvungin saman við lóg, fyrri ella seinni allíkavæl.

Páll dugir sjálvur ikki at síggja nakrar fyrimunir við hesum sum so. Men hann heldur tað vera betri, at kommunurnar sjálvar tosa seg til sættis í hesum máli.
- Eg haldi, at rættiliga nógv fólk eru fyri eini samanlegging, sigur hann.

### – Eingin fyrimunur fyri okkum



Mai Fuglø stóð og egndi henda seinnapartin. Men fyri hana er eingin ivi um, at hon er ímóti eini samanlegging:

- Hygg bara eftir Árnafirði. Eg dugi ikki at síggja, at henda bygdin hevur havt nakran fyrimun at vera saman við Klaksvík, sigur Mai.

Hon dugir kortini at síggja, at tað kunnu vera fyrimunir við eini samanlegging. Men tað er alt treytað av, hvørjar sømdir tann minna kommunan kann fáa.

- Men sum nú er, eri eg ímóti eini samanlegging, sigur hon avgjørd.

### – Hopi ikki at teir leggja saman



John Simonsen er ættaður úr Hvannasundi, men býr í Klaksvík.
Hann kennir tí til málið frá báðum síðum. Men sum hann tekur til:

- Eg eri bangin fyri, at vit verða forsømd í eini samanlegging. Eg vil ikki hopa, at teir leggja saman, sigur John.

Hann hevur hesa støðuna út frá tí veruleika, at Hvannasund er eitt minni øki í mun til Klaksvík, og at tað vísir seg mangan, at tey størru økini verða meiri raðfest enn tey smærru.

- Tað er so skjótt, at átrokandi mál verða forsømd, til dømis tá talan er um útstykkingar og umstøðurnar til vinnulívið.

- Hygg bara eftir Árnafirði. Teir sum tá vóru í mínum aldri, høvdu trupulleikar við at fáa grundøki har. Har hevur lítil menning verið tey seinnu árini, og tí hon er við at doyggja út, sigur hann avgjørdur.